# Reglur um hvørjar íløgur starvsfólk landsbankans kunnu gera í virðisbrøv.

1.Hvønn fevna íløgureglurnar um.

Íløgureglurnar fevna um stjóra, øll starvsfólk í landsbankanum, nevnd og váðaráð.

2. Íløgur í virðisbrøv.

Talan er um íløgur í føroysk virðisbrøv (partabrøv og lánsbrøv) í føroyskum fíggjarstovnum

## *Viðmerkingar.*

Starvsfólkini í landsbankanum arbeiða í tveimum ymsum virksemisøkjum, sum gera tað neyðugt at hava reglur um, hvørji virðisbrøv starvsfólk og nevnd kunnu eiga.

1. Umsiting av ogn og skuld hjá landskassanum.

2. Fíggjarligt støðufesti

Av tí at landsbankin hevur makroeftirlitið við fíggjarliga geiranum í Føroyum og kann sita inni við upplýsingunum, sum almenningurin ikki hevur, kunnu starvsfólk í landsbankanum ikki gera íløgur í føroysk virðisbrøv í føroyskum fíggjarstovunum, tað er bæði partabrøv og lánsbrøv. Eitt nú fáa starvsfólkini í landsbankanum, sum arbeiða við fíggjarliga støðufestinum nógva vitan um føroysku peningastovnarnar og tað er sannlíkt at tey vita í góðari tíð frammanundan, um tiltøk vera gjørd, sum gera umstøðurnar hjá føroyskum peningastovnum at vinna pening úr virksemi sínum. Hetta ger at tey kunnu fáa upplýsingar, sum kunnu nýtast at fáa vinning (ella minka tap) við at gera íløgur í (ella selja) føroysk peningastovnspartabrøv. Tó verður ikki mett at upphæddir undir eitt minstamark hava nakran týdning, og tí verður eitt minstamark á 25.000 kr.

Eisini stendur landsbankin fyri lántøku landskassans og hevur tí innanhýsis vitan um rætta prísin á lánsbrøvum landskassans. Tað skal ikki kunna sást ivi um, at starvsfólk hjá landsbankanum bara arbeiða fyri áhugamálini hjá landsbankanum.

**Mælt verður tí til**:

- At starvsfólk, nevnd og váðaráð ikki kunnu keypa partabrøv ella lánsbrøv í føroyskum fíggjarstovnum fyri meira enn eitt virði á tilsamans 25.000.
- Um starvsfólk, nevnd og váðaráð, tá tey vera sett í starv, eiga partabrøv ella lánsbrøv í føroyskum fíggjarstovnum, er tað í lagi. Um virði er meira enn 25.000 kr, eiga tey at selja niður til hesa upphædd ella lægri, tá vindeyga fyri hesum er opið hjá starvsfólkum í viðkomandi fíggjarstovnum.
- Partabrøv og lánsbrøv hjá føroyskum fíggjarstovnum, sum pensjóngrunnar, sum starvsfólk, nevnd ella váðaráð hava sína pensjón hjá, telja ikki við.
- at starvsfólk í landsbankanum ikki kunnu eiga landskassalánsbrøv.

## *Serligar reglur fyri starvsfólk, sum keypa og selja virðisbrøv.*

Frontrunning: Frontrunning er, at ein íløgurøktari kann keypa eitt virðisbræv til sín sjálvs, beint áðrenn hann keypur eina stóra nøgd av sama virðisbrævi til stovnin hann arbeiðir fyri ella fyri kundar hjá stovninum. Við stóra keypinum av virðisbrøvunum kann kursurin fara upp. Í hesum føri kann hann selja virðisbrøvini stutt eftir við nærum ongum váða og fáa vinning av hesum.

Íløgurøktarfeløg hava forboð móti frontrunning í innanhýsis reglum.

Eitt starvsfólk hjá landsbankanum hevur til ábyrgd at plasera stuttfreistaða gjaldførið hjá landsbankanum. Hetta verður gjørt beinleiðis í donsk statslánsbrøv og realkredittlánsbrøv.

Av tí at donsku statslánsbrøvini og realkredittlánsbrøvini eru likvid virðisbrøv, er ikki sannlíkt at eitt keyp frá landsbankanum ávirkar kursin á teimum.

**Mælt verður tí til:**

- Ikki at hava serligar reglur fyri starvsfólk í landsbankanum, sum keypa og selja stats- og realkredittlánsbrøv.
- Um so er, at starvsfólk aftur fara at keypa og selja einstøk partabrøv ella íløguprógv vegna landsbankan/AMEG, so er tað teimum forboðið sjálvi at gera íløgur í hesi partabrøv/íløguprógv í ein mánað áðrenn og ein mánað aftaná, at landsbankin ella AMEG gera íløgur í hesi partabrøv/íløguprógv.
- Starvsfólk sum keypa og selja partabrøv hava tó sama forboð móti at keypa og selja partabrøv í føroyskum fíggjarstovnum sum hini starvsfólkini.